

## Eigaraíbúð á Niðaragøtu 17, Hoyvík til sølu

Ognin matr.nr. 1ym, Niðaragøta, Hoyvík er til sølu um hóskandi boð fæst. Íbúðin er 87 m2 til støddar og liggur sera væl fyri við góðum útsýni og í barnavinarligum umhvørvi. Parkeringsumstøðurnar eru góðar.

Íbúðin er í tveimum hæddum. Í niðaru hæddini er gongd, vaskirúm, wc, køkur og stova. Í ovaru hæddini er gongd, baðirúm, sovirúm, tvey kømur, og eitt goymslurúm.

Í íbúðini er fjarhiti, umframt felags antennuskipan. Íbúðin er limur í eigarafelagnum "Inni á Gøtu".

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 · 100 Tórshavn
Tlf. 311260, fax. 311261
e-mail: ge@lawfirm. fo

Tormóður Djurhuus, adv., Jógvan Páll Lassen, adv., Petur Even Djurhuus, adv., Jógvan E. Ellefsen, adv., Anna Dam, adv., Ingi Højgaard, adv.

## Citroën Berlingo HDi 2.0 Diesel



- *Árg. Juni 2005*
- *Koyrt 32.000 km*
- *Tráðleyst centrallás*
- *Servo-stýring*
- *Fløguspælari*

Er brúktur til koyring millum Leirvík og Havn. Til sølu vegna flyting av landinum.
Eyka felgir, uttan dekk, fylgir við.

***Tlf. 227894/443443***

## 20 tons bátur

við fiskiloyvi til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 580142**

## Starvsfólk til kaffistovuna í Føroyahúsinum

Kaffistovan í Føroyahúsinum er miðdepilin í húsinum, hagar fólk koma at hitta onnur, koma á fund, at lesa bløð, lána bøkur ella at keypa sær ein drekkamunn við einum góðum bita afturvið. Javnan eru eisini veitslur og privat tiltøk av ymsum slag: skeið, brúdleyp, føðingardagar, konfirmatiónir o.a. Nøkur feløg hava innivist her. MFS, ferðamanastovan My Faroe og Føroyska Ráðgevingin hava skrivstovu.

**Førleiki tín:**
Søkt verður eftir einum fólki, kvinnu ella manni, sum serstakliga kann vera við til at menna okkara kaffistovu í Keypmannahavn og í samstarvi við leiðsluna taka sær av rakstrinum. Tí er av týdningi at tú:

- hevur áhuga fyri vælferð og trivnað hjá gestunum
- er kreativ/ur, ágrýtin og fryntlig/ur
- hevur hug og hegni at samstarva við onnur og sjálvboðin í húsinum
- kanst laga teg eftir skiftandi arbeiðstíðum
- dugir at keypa eins væl og at selja vørur og tænastur
- hevur hug og hegni til matgerð og borðreiðing
- hevur kunnleika um føroysk viðurskifti

**Vit kunna bjóða tær:**

- áhugavert starv, har tú kanst seta tín egna dám á arbeiðslag og umhvørvi
- eitt arbeiðspláss, har tú hittir nógvar landsmenn
- góð arbeiðskor og løn eftir førleika
- avtalu um frítíð og smáskeið

Hevur hetta tín áhuga, ert tú væl komin at ringja ella senda teldubræv og fáa upplýsingar um starvið hjá leiðaranum í húsinum. Umsókn verður send til **Føroyahúsið í Keypmannahavn, Vesterbrogade 17A, 1620 København V.** Umsóknarfreistin er 25. juli. Tað er av áhuga hjá okkum, at tú kanst byrja 1. septembur ella fyrr og vera til í hvussu er næsta summarið.

**Føroyahúsið í Keypmannahavn**
postur@faroehouse.dk www.faroehouse.dk
tlf. +45 33231587 /+45 20167274

**Internet Sosialurin**
**www.sosialurin.fo**




**Útferðir í Norðoyum:**
Frá Hvannasundi og norður um Enniberg, ella runt Fugloy ella Svínoy. Eisini beinleiðis til Svínoy og Fugloy eftir avtalu. Vit eru til taks alt døgnið. Ring: m/b. Alpha Pilot
**telefon 22 08 49**

**Lesið Sosialin**

## Nólsoyar skúli

Skúlaárið 2006/07 eru trý tíðaravmarkað størv at søkja í Nólsoyar skúla :

1 fulltíðarstarv fyri lærara í farloyvi
1 fulltíðarstarv vegna avlopstímar, lækkað tímatal og serligan tørv
1 starv uml. 7 t/v vegna avlopstímar

Størvini verða sáttmálasett uttan so, at tann, ið settur verður er tænastumannasettur frammanundan. Til eitt av størvunum verður endaliga tímatali ikki ásett fyrr enn 1. sept. 2006.

Størvini verða lønt sambart avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

Nólsoyar skúli er lítil skúli við uml. 30 næmingum frá 1. til 9. flokk.

Flokkarnir eru í flestu førum samanlisnir í 3 bólkum eftir aldri.

Vit arbeiði í tøttum toymi og nógv av undirvísingini hevur støði í tvørgreinaligum, verkætlanarvendum arbeiðsgongdum, sum tekur støði í einkulta næminginum.

Hetta er spennandi, gevandi, men eisini avbjóðandi undirvísingarháttur og krevur :

- Tætt toymissamstarv
- Sjálvsstøði
- Hugflog og nýhugsan
- Góð samskiftisevni
- Evni at hava yvirlit

Umsøkjarar skulu kunna undirvísa á 1. undirvísingarstigi (1.-3.fl.) serundirvísing/serligur tørvur og annars innan fleiri lærugreinaøki frá 1. til 9. flokk.

Umsóknir við avrit av prógvi, c.v. og møguligum viðmælum skulu verða skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. juli kl. 14.00

Nærri upplýsingar fáast frá Gunnvør Joensen, skúlaleiðari tlf. 327119 ella 392465. Teldupostadr. Gunnvoer.joensen@skulin.fo

## TOYOTA reservedele

Vi kan tilbyde Danmarks største udvalg i nye og brugte reservedele til Toyota.

**Vi sender fra dag til dag til Færøerne.**

DKAUTO.DK
AUTOGENBRUG - SPECIALE TOYOTA
Flensborgvej 340 - 6200 Aabenraa
tlf. +45 7461 4110 - fax +45 7461 4164
email: salg@dkauto.dk - www.dkauto.dk

Forhenværende
Aabenraa Autogenbrug

ISO 9001 certificeret

DAG Dansk Autogenbrug - vi skåner miljø og økonomi

Autoophuggernes DATALAGER DK